# ArtiCon søkir eftir VERKFRØÐINGI/BYGGIFRØÐINGI

Vegna vaksandi virksemi og víðkað virkisøki søkja vit eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi

Í samstarvi við leiðsluna og onnur í fyrisitingini fevnir starvið í høvuðsheitum um:

- Projektleiðslu
- Tilboðsrokning
- Avseting og uppmáting

Fyri rætta fólkið er talan um eitt starv við spennandi avbjóðingum, sum geva góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning. Viðkomandi kemur at arbeiða í einum toymi av teknikarum og formonnum.

Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving innan verkfrøði og/ella byggitøkni, og helst nakað av royndum innan omanfyri nevndu arbeiðsøki. Hetta seinna er tó eingin treyt.

Tað er umráðandi, at viðkomandi, ið settur verður, hevur góð samstarvsevnir, og dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult. Nærlagni og gott fíggjarligt skil eru eisini umráðandi dygdir.

Góður kunnleiki til edv-skipanir so sum MS-Office, AutoCad, MS Project og Revit er ein treyt. Eisini er ynskiligt, at viðkomandi hevur góðar førleikar til at tosa og skriva føroyskt, danskt og enskt.

Løn og setanartreytir verða samsvarandi útbúgving og royndum og annars eftir avtalu partanna millum.

Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:

**P/F Articon**
Postboks 3109
110 Tórshavn

ella við telduposti til jon@articon.fo.

Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2011.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jón Danielsen, tel. 350 700 ella 210 683.

Sosialurin 341800

ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705

*Articon er ein byggifyritøka í støðugari menning. Felagið tekst við alt slag av byggi- og anleggsarbeiðum - bæði størri og smærri. Somuleiðis gera vit eisini alt slag av apteringsarbeiðum umborð á bátum og skipum. Tað starvast í dag umleið 110 fólk hjá okkum, býtt millum arbeiðsfólk, handverkarar, maskin- og lastvognsførarar, formenn, byggi- og verkfrøðingar og skrivstovufólk. Felagið hevur skrivstovu á Hjalla í Hoyvík.*



SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

# Eftirlitsfólk til Sjóvinnustýrið

**Av tí at ein av okkara starvsfeløgum hevur fingið farloyvi verður søkt eftir eftirlitsfólk til Sýnsdeildina at byrja skjótast til ber. Starvið er tíðaravmarkað og verður sett fram til 1. august 2012.**

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**

- Sýn og málsviðgerð í samband við nýbygningar, umbyggingar, innflaggingar, v.m.
- Fremjan, uppfylgjan og málsviðgerð av tíðarbundnum sýnum.
- Heilt ella lutvíst, at stýra undirveitaraøkinum, og at hava eftirlit við løggildaðu undirveitarunum.
- Røkt av maskintekniskum uppgávum og luttaka í tvørgangandi verkætlanum.
- Kanning av vanlukkum á sjónum.

***Útbúgvingarkrav:***
Til starvið krevst ein av niðanfyri nevndu útbúgvingum:

- 3 ára Maskinmeistaraútbúgving við sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri, STCW III/2
- Verkfrøðingur við maskintøkni innan sjóvinnu sum serfrøði.

Ynskiligt er, at umsøkjari hevur starvsroyndir innan dygdarmenning, herundir ISM og ISO 9001 skipanir.

**Førleikakrøv:**

- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Gott tekniskt innlit
- Góð samstarvsevnir

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er Sjóvinnustýrið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Vinnumálaráðnum. Starvið verður sett sum skjótast.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Sjóvinnustýrinum í hendi í seinasta lagi 5. mai 2011, kl. 15.00.

Fyrispurningar um starvið kunnu setast til Jákup K. Poulsen, samskipara ella Vilhjálm Gregoriussen, stjóra.

**Umsóknir skulu sendast sum bræv ella teldubræv til:**
SJÓVINNUSTÝRIÐ, POSTSMOGA 26, FO-370 MIÐVÁGUR ELLA FMA@FMA.FO






## AÐALFUNDUR
Stuðlafelagið ÍSB hevur aðalfund í B36-húsinum týsdagin 3 mai kl.18.
**Nevndin**

## DUNNUEGG
Dunnuegg til sølu,
4 kr stk.
**269663**

## LFB AÐALFUNDUR
verður 30. apríl kl 13.30 í Fuglafirði Skrá sambært lógina.
**Landsfelagið fyri Bjargingarfeløgini**

Søkt verður eftir elektrikara at byrja beinavegin.
Áhuga kunnu venda sær til elnet á telefon 284800

el | net
Tlf. 60 00 60
Løggildur el-innl.

## AÐALFUNDUR
Ársaðalfundur verður í Bygdarhúsinum 27. apríl kl. 20. Dagsskrá sambart lógum felagsins.
**Bygdarhúsfelagið Leirvík**